VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Handilsvinnufelagið**

**Fíggjarnevnd Løgtingsins**

Tórshavn 6. november 2025

## Hoyringsvar til uppskotið til løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning

Handilsvinnufelagið var tann 6. oktober 2025 á hoyringsfundi í fíggjarnevndini um uppskotið til hægri avgjøld á tubbak og snús. Handilsvinnufelagið loyvir sær í hesum sambandi eisini at koma við eini skrivligari viðmerking til gildiskomuásetingina, sum umframt onnur viðurskifti var løgd fram á hoyringsfundinum í fíggjarnevndini.

### Gildiskomuásetingin

Í grein 2 í uppskotinum, undir "Gildiskoma og virknaður" verður lagt upp til, at broytingarnar koma í gildi, eftir at lógin er kunngjørd, og hevur virknað frá framløgudegnum. Tað er serliga parturin viðv. virknaðinum, sum Handilsvinnufelagið skal vísa á.

Talan er um eitt uppskot, sum ikki er sent til hoyringar, og tí hevur hvørki handilsvinnufelagið ella viðkomandi partar havt møguleika fyri at viðmerkt uppskotið áðrenn tað varð lagt fyri Løgtingið. Ei heldur er nøkur kunning komin til innflytarar ella til almenningin um, at avgjaldshækkingarnar ætlandi skulu koma í gildi við afturvirkandi kraft frá framløgudegnum. Innflytarar hava tí ikki varnast hesi viðurskifti, fyrr enn rúma tíð, aftaná at uppskotið er lagt fram. Í framløguni av Fíggjarlógini varð sagt, at ætlanin var at hækka avgjaldið við 20 kr. fyri hvørja dós, og 6 kr. fyri hvønn pakka av sigarettum, men einki varð sagt um, at ætlanin var at gera hetta við afturvirkandi kraft.

Ásetingin um *virknað frá framløgudegnum* hevur av somu orsøk havt stórar avleiðingar fyri teir aktørar, sum innflyta snús og tubbak í dag. Hesir aktørar fyrihalda seg til og virkað undir galdandi lógum og reglum ísv. innflutning av hesum vørum. Í hesum liggur, at aktørarnir selja sína vøru við støði í galdandi avgjøldum. Uppskotið leggur tó upp til, at hesir somu aktørar skulu virka undir reglum í dag, sum fáa gildi tá lógin kemur í gildi, men við afturvirkandi virknaði. Hetta merkir, at tann fortreytin, sum aktørarnir grundað sín prís á í dag ikki eru galdandi. Sum dømi kann sigast, at fortreytin hjá aktørunum fyri at selja snús er í veruleikanum 1.290% hægri í krónum, enn tað teir hava selt hesar vørur fyri síðan framløgudagin 30. september 2025.

Um gildiskomuásetingin verður standandi, sum hon er orðað í dag, so fær hetta tískil stórar fíggjarligar avleiðingar fyri hesar aktørar, tí hesir koma at standa við eini milliónaupphædd í eykarokningum, fyri vøru, sum teir longu hava selt. Handilsvinnufelagið mælir tí staðiliga til, at virknaðurin av broytingunum í fyrsta lagi verður sama dag, sum lógin fær gildi. Hetta so at aktørarnir hava møguleika fyri at tillaga prísin ímun til avgjaldshækkingarnar áðrenn tær fáa virknað.

Vinarliga
Handilsvinnufelagið

Alvi Hjelm

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo